# upultmoralurin



g Kina bert økja um síni kjarnorkuvápn í eini kapprenning, sum ger heimin til eitt vandamiklari
ív er ognað bardaganum ímóti hópoyðingarvápnum

Mynd: Sunva Lassen

hann ikki, at núverandi strategi er gongda leiðin.

- ST og USA eiga sum skjótast at seta seg við samráðingarborðið og tosa við iranar, eins og vit á sera væleydnaðan hátt gjørdu við Norðurkorea. Í staðin fyri diplomati eru relatiónirnar millum Iran og serliga USA gjøgnumsúrgaðar av fíggindagering, og Iran kennir seg hótt við aggressiva retorikkin úr Hvítu Húsunum um *Rogue States* og *The Axis of Evil*. Iran ynskir fyrst og fremst eitt treytaleyst lyfti um trygd frá USA og altjóða samfelagnum, og tað skulu teir fáa, um hetta er prísurin fyri at steðga kjarnorkuætlanum landsins, metir Hans Blix.

Hann heldur, at sunt diplomatiskt skynsemi hevur verið fráverandi í royndunum at steðga, at Iran fær møguleikan at framleiða kjarnorkuvápn. Og í staðin fyri at nýta Norðurkorea sum modell, har treytaleysur dialogur uttan hóttanir vísti seg at geva úrslit, verður enntá tosa um bumbuálop á Iran.

- Eitt hernaðarligt álop hevði verið katastrofalt og hevði havt øvugtar avleiðingar. Um iranska stjórnin ikki ætlar at framleiða eina kjarnorkubumbu nú, so høvdu teir ætlað tað eftir eitt álop. Bumbuálop á útbúnaðin fyri kjarnorkuframleiðslu seinkar bert gongdini í nøkur fá ár, og eins og við Irak er talan enn um ógrundaðar gitingar um, at landið veruliga ætlar sær hesi vápn. Iran er fleiri ár frá eini skitnari bumbu, og tí er tað alt í verðini ov tíðliga til yvirhøvur at tosa um hernaðarligar loysnir. Mítt ráð er at troyta allar hugsandi diplomatiskar leiðir fyrst, slær Blix fast.

## Ónda ringrásin

Og júst prátið um Iran leiðir okkum aftur til tað, sum sambært harra Blix er grundleggjandi trupulleikin. Og tað er, at tey átta londini, sum longu hava kjarnorkuvápn (sí faktakassa), ikki vísa nakran sum helst vilja til at avvápna seg sjálvi, samstundis sum stóru kjarnorkuveldini fara í hernað ímóti øðrum londum, sum menna kjarnorku, og sum kanska – og kanska ikki – hava í hyggju at framleiða kjarnorkuvápn. Tað er sambært Blix himmalrópandi dupultmoralur og ein ónd ringrás, tí statir kenna seg sárbærar uttan ógvusligu vápnini. Úrslitið er ein domino-effekt. Ein hættislig kapprenning um enn sterkari og meiri nýmótans hópoyðingarvápn.

- Tað snýr seg um at skapa eitt altjóða umhvørvi, har hópoyðingarvápn ikki eru neyðug. Men tað vera tey, tá USA, Ongland, Russland og Kina bert økja um kjarnorkuvápnagoymslurnar í eini kapping, sum ger heimin til eitt vandamiklari stað. Og við aktuellu ætlanini hjá amerikumonnum um eitt missilskjøldur í Eysturevropa kenna Kina og Russland seg noydd at dubba seg enn meiri, um tey skulu fylgja við, sigur Hans Blix.

Sjálvur hevði hann ynskt, *non-proliferation* avtalan um, at nøgdin av kjarnorkuvápnum stigvíst skal minkast, varð fylgd. Avtalan verður eftirmett fimta hvørt ár í ST, seinast í 2005, og niðurstøðan er, at tað í løtuni gongur øvugtan veg.

-Fyri vesturlendsku kjarnorkuveldini snýr tað seg ikki um vápnini sjálv, men heldur um, hvør hevur tey. Pakistan er eingin trupulleiki, tí hernaðarstýrið er ein amerikanskur allieraður, og USA hevur beinleiðis hjálpt India at fáa kjarnorkuvápn, helst fyri at skapa eina alliansu ímóti Kina. Men tá tað kemur til Norðurkorea, Iran og Libya, so eru trupulleikar, tí mann ikki brýggjar seg um, hvør situr við stjórnarvaldinum. Við hesum hugburði verður tað ógjørligt at avvápna heimin, sigur Hans Blix.

## Globalisering og yvirgangur

Men mitt í øllum prátinum um hópoyðingarvápn og ræðumyndir um heimsins undirgang er tað kortini eisini rúm fyri bjartskygni í hugaheiminum hjá 79 ára gamla manninum uppi á Hotel Føroyum.

- Globaliseringin hevur elvt til ein ófatiligan interdependens, sum bindur okkum øll saman og ger allar statir úr eystri í vestur úr suðuri í norð tengdar at hvørjum øðrum, ikki minst búskaparliga. At heimurin er tættari samanknýttur enn nakrantíð áður, ger tað minni sannlíkt, at nakar statur í veruleikanum skuldi funnið uppá at nýtt kjarnorkuvápn. Tað er irrationelt, sjálvt fyri sera ivasamar politiskar leiðarar. Hesi vápnini hava hóast alt ikki verið nýtt síðani 1945 (tá USA kastaði tvær kjarnorkubumbur oman yvir japansku býirnar Hiroshima og Nagasaki tann 6. og 9. august í 1945, blðm.), og tí kunnu vit eisini loyva okkum at vera bjartskygd, hóast tað í løtuni gongur skeiva vegin, sigur Hans Blix.

Kona hansara Eva er nú komin av kamarinum og stendur og bíðar í forhøllini. Tey bæði skulu nevniliga ein túr í hagan um eina løtu. Men áðrenn Blix reisist, skundi eg mær at seta honum spurningin um, hvussu tætt altjóða terroristar eru hesum vápnum. Og her tosi eg ikki um nationalstatir og altjóða felagsskapir við eini adressu og einum telefonnummari. Her tosi eg um anonymar yvirgangsbólkar, sum operera uttanfyri nationalstatsligu karmarnar. Bólkar, sum ikki kenna seg alt meiri tengdar at restini av heiminum, sum Blix tosar um, og sum fegnir vilja lata lív fyri einum hægri máli. Nær síggja vit tað fyrsta yvirgangsálopið, har hópoyðingarvápn verða nýtt?

- Well, tað er sjálvandi ein vandi, sum altjóða samfelagið eigur at vísa størsta ans. Men í løtuni hava yvirgangsfelagsskapir heilt einfalt ikki tólini til at framleiða hópoyðingarvápn, og tað letur seg illa gera at framleiða hópoyðingarvápn í loyndum, uttan at landsins stjórn veit av tí. Og so er tað jú kortini ein nationalstatur, sum er involveraður og gevur grønt ljós, um hópoyðingarvápn skulu framleiðast og nýtast. Hendan sannroynd styrkir mína tesu um, at eitt yvirgangsálop við hópoyðingarvápnum er ósannlíkt, metir Hans Blix.

Men hann gevur mær kortini rætt í, at »røttu« vápnini í hondunum á teimum skeivu fólkunum av sonnum er ein »disturbing thought«, sum hann málber seg.

Eva ótolnast, og Hans Blix reisir seg. Gud viti, hvussu ofta hon tilsamans hevur bíðað eftir manninum, sum milt sagt verður yvirfallin av journalistum, hvagar hann so kemur. Men áðrenn hann fer, vendir hann sær á:

- Eg eri ikki pasifistur, og tað er ST-lóggávan heldur ikki. Men kríggj eigur at vera undantakið, meðan diplomati, diplomati og aftur diplomati eigur at vera reglan, sum altjóða samfelagið eigur at dúva uppá, tá stríð taka seg upp. Dupultmoralurin má steðga, og kjarnorkuveldini mugu nú lyfta í felag, tekur Hans Blix samanum.

Og vit vita eftirhondini, hvør adressan er...

## FAKTA

**- um kjarnorkuvápn:**

Átta lond hava í løtuni kjarkorkuvápn. Tey eru **USA, Ongland, Frakland, Russland, Kina, India, Pakistan og Ísrael**. Hóast samlaða nøgdin av kjarnorkuvápnum er farin úr **55.000** niður í **27.000** síðani kalda kríggið, er nøgdin í løtuni í vøkstri. **188** lond eru limir í *Nonproliferation*-avtaluni frá 1968, hvørs endamál er at koma niður á **1000** hópoyðingarvápn. Fyrstu og einastu ferð, at kjarnorkuvápn hava verið nýtt, var, tá **USA** blakaði tvær bumbur oman yvir japansku býirnar **Hiroshima** og **Nagasaki** í **1945**. USA er eisini tað landið, sum stendur fyri helvtini av útreiðslunum fyri samlaðu nøgdini av kjarnorkuvápnum.